# Grundøki tøk á Strondum

**Nú líkt er til, at gongd er aftur komin á málið um Skálafjarðartunnilin, bjóðar Sjóvar kommuna nú fleiri grundøki í bygdini.**

GRUNDØKI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Strendur:** Tá hesin tunnilin gerst veruleiki, verða bert fáir minuttir at koyra av Strondum til Havnar ella øvugt.

Hetta ger sítt til, at kommunan nú boðar frá, at grundøki eru tøk á ikki færri enn trimum støðum í bygdini – á Hálsagøtu og á Rættartrøðni, og í teirri stóru útstykkingini í Lánni.

Prísurin fyri hesi grundøkini má sigast at vera rímiligur – 85 kr. fermeturin á Hálsagøtu, 125 kr. á Rættartrøðni og 200 kr. í Lánni.

Av kommunuskrivstovuni verður sagt, at tey ið hava áhuga fyri hesum økjum, kunnu venda sær skrivstovuna fyri at frætta nærri um hesi økini.



*Góðir møguleikar at seta búgv á Strondum*

## Raðfesting samgongunar rakar trivnaðin hjá teimum eldru

KÁRI P. HØJGAARD
løgtingsmaður



Framskrivaða fíggjarlógaruppskotið fyri 2009 er nú komið aftur í Løgtingið við teimum fráboðaðu raðfestingum, ið samgongan ætlar at fremja.

Eitt sum fellir í eyguni er, at lógarbundni stuðulin til Umsorgarararbeiðið bert kemur at fevna um mattænastu, meðan stuðulin til dagtilhald 4 milliónir fellur burtur.

Ætlanin er við lógarbroyting at leggja hesa útreiðslu yvir á kommunurnar. Fleiri kommunur eru fíggjarliga sperdar og hava lagt fíggjarætlan fyri komandi ár, uttan at tær eru kunnaðar um hesa eykaútreiðsluna. Tí er eyðsæð, at verður hendan ætlan landstýrisins staðfest av Løgtinginum, koma vit eisini at fáa A og B kommunur, tá talan verður um trivnaðin hjá eldra ættarliðinum. Uttan iva, koma nøkur av verandi tilhaldum at lata aftur, tí kommunurnar ikki megna uppgávuna við so stuttum skotbrá.

Tað verður ein harður smeitur fyri okkara eldru borgarar, sum hava fegnast um tann møguleika, tey hava havt á dagtilhaldunum kring landið.

## Ein óroyndur lærlingur hevur verið harmonikutúr í Íslandi

ROLF GUTTESEN



**Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, hevur verið eitt ørindi í Íslandi. Bløðini siga, at frúan var við. Týskvøldið frættist so, at íslendski uttanríkisráðharrin, sum er ein kvinna, hevði bjóðað føroyingum at hava sendistovur í teim íslendsku í Moskva og Geneve. Og Útvarpið sigur frá, at Jørgen Niclasen tók móti tilboðnum**

At hatta yvirhøvur kemur upp á tal á fundi á næsthægsta stigi, boðar frá illum. Hví krámar og gramsar íslendingurin so upp á Jørgen?

Og hví tekur Jørgen ímóti einum slavnum tilboði? Eg meini, at hetta er landsskaðiligur aktivitetur.

**Føroyar í lummanum á triðja-landi**
Eitt er, at skandinavisku londini onkunstaðni hava ambassadur í sama bygningi ella kompleksi. Annað er, at lítlu Føroyar fara í lumman hjá øðrum suverenum stati. Tað er nokk óhoyrt í søgu diplomatisins.

Annað er, hví tað skal vera so gott at vera í stovu hjá íslendingum? Faktum er, at Føroyar saman við Grønlandi eru ein partur í Ríkisfelagsskapinum. Landsstýrið kann brúka allar tær donsku ambassadurnar í heiminum, sum tað hevur hug til. Og hava føroyska flaggið veitrandi, sjálvandi.

**Gamaldags nationalisma spillir spælið**
Men nei, her kemur ein gamaldags og skaðilig nationalisma inn og spillir spælið. Minnist rokið, tá Landsstýrið skuldi hava sendistovu í Reykjavík, og tað skuldi vera saman við donsku. Rok og buldur frá Fólka- og Tjóðveldisflokki. So heldur í aðrari gøtu, uppi undir tróðrinum oman á einari pornobutikk.

Er tað fyri at gera tað bíligari? Nei, tí møguleikin at hava diplomati saman í donsku ambassadunum hevur altíð verið har.

Avgerandi í diplomatiskum arbeiði hevur altíð verið at skaffa vitan, informatiónir, um mótpartin og onnur lond. Diplomatpostur er skipaður eftir serligum reglum, so tað sleppur undan tolling og øðrum eftirliti. Tað skal kunna fara órørt frá ambassadu til heimlandið.

**Hava als ikki felags interessur**
Føroyar og Ísland hava yvirhøvur ikki felags interessur, men eru beinleiðis mótpartar, tá tað snýr seg um vital mál, til dømis býti av norðhavssild, svartkjaftakvotum og aðrar kvotur, sum eru lívsneyðugar fyri føroyska vinnulívið.

Í avgerandi málum hava londini beinleiðis mótstandandi interessur.

Ber tað til, at blanda fólk frá sambiðlum í somu skrivstovu. Nei hatta er óðamannaverk. Ein óroyndur lærlingur hevur verið harmonikutúr í Íslandi.

# Ætlan um minnisvarða á Glyvrum



*Glyvrar er gomul bygd. Nú ætlar bygdarfólkið at reisa ein minnisvarða her*

**Eitt av seinastu málunum, sum býráðið í Runavík viðgjørdi fyri kommunuvalið, var eitt um at reisa ein minnisvarða á Glyvrum**

Kommunan hevði nevniliga fingið eina áheitan frá Rasmusi Glyvradal um at skipa so fyri, at ein minnisvarði kundi verðið reistur yvir glyvramannin Niels Jacobsen.

Tað sum sermerkti henda mannin var at hann var ættfaðir hjá glyvrafólki.

Á fundi frammanundan hevði mentanarnevndin samtykt at seta ein arbeiðsbólk at arbeiða víðari við málinum. Nevndin skjeyt upp at manna eina nevnd til hetta, og at hesi trý skuldu manna hesa: Maria Jacobsen, Regin Jacobsen og Rasmus Glyvradal.

Á býráðsfundinum 30. oktober varð samtykt at beina málið aftur í mentanarnevndin.

Glyvrar er gomul bóndabygd sum er nevnd longu í 1584. hon kann vera eldri enn tað.

**sb.**

# Lovsangskvøld í Leirvík

Um vikuskiftið verður bæði skipað fyri lovsangskvøldi og ungdómsgudstænastu í missiónshúsinum Leirvík.

Á skránni verður m.a. nógvur sangur, har tónleikabólkurin TOS kemur at framføra og Marius Jacobsen hevur eina andakt.

Eftir lovsangsløtuna verður drekkamunnur. Síðani verður eftirmøti við sangi, sangframførslu og fríari vitniløtu.

Sunnukvøldið 23. nov. kl. 20 verður ungdómsgudstænasta í Leirvíkar Kirkju við Hanus Simonsen, presti. Á skránni verður m.a. tala, felagssangur, sangframførsla við Elly Justinussen, tvørfloytuspæl og altargongd. Eftir ungdómsgudstænastuna verður suppa at fáa í Missiónshúsinum.

**sb.**

**TOS** stendur fyri **T**ollarar **O**g **S**yndarar. Teir eru ein nýggjur bólkur við garvaðum tónleikarum. Teir framførdu á Fjarðafestivalinum í ár, og tað var ein sera góð og áhugaverd framførsla. Teirra tónleikur er lívligur og festligur at lurta eftir. Eisini hava teir ein sera góðan boðskap í teirra tekstum. Við í TOS eru Bárður á Lakjuni, John Eliassen, Eiler Hansen, Jógvan Símin Sevdal og Jan Nónklett.